VALGREINAR

Rækjuflotin

# Rættindi skulu vinnast og verjast !

**Sigfríður Dam Olsen**
*valevni Javnaðarfloksins í Vágum*



Mangan hevur leikað hart á, tá føroyingar skulu hava vunnið og vart rættindi. Øll minnast vit stríðið um fiskimørk okkara og mótstøðuna móti innliman í EEC ella ES, sum tað nú eitur.

Onnur mál eru rættindi til oljuna í undirgrundini, og rættin til fiskiríkidømi. Í øllum hesum málum og mongum øðrum við, hava vit føroyingar staðið saman sum ein maður.

Við stríð og strev hava vit nú vunnið ræðið á tilfeinginum innanfyri okkara búskaparmørk, men harafturat hevur ein partur av okkara fiskimonnum og reiðarum, við tógvið stríð megnað at vunnið okkum tjóðarrættindi á fjarskotnum fiskileiðum. Her verður sjálvandi hugsað um rættindi okkara at fiska rækjur á Flemish Cap, Eysturgrønlandi og við Svalbard. Hesi tjóðarrættindi eru einastu rættindi, vit eiga, uttanfyri okkara sjómark, og hesi rættindi kunna vit bert verja við at fremja okkara nýtslurætt.

Úti í stóru verð verður kríggjast fyri slík rættindi, og tjóðir sum Japan og USA brúka milliardir av krónum fyri at verja líknandi rættindi. Fyrimyndarliga stríðast eisini grannar okkara Ísland og Noreg fyri at varveita rættin til hvalaveiðu.

Her heima hava vit ENN nakrar fiskimenn og reiðarar, sum eru til reiðar at verja hesi rættindi okkara, men sera vánaligur marknaður fyri rækjum, høgur oljuprísur, stórar eykaútreiðslur í mun til flotan annars og vánaligar arbeiðsumstøður, hava gjørt hesa vinnu sárbara. Og um ikki hetta var nógmikið, so hevur sannur politiskur ágangur tikið seg upp ímóti rækjutrolarunum.

Tað skal als ikki vera nøkur loyna, at Javnaðarflokkurin vil verja hesi tjóðarrættindi okkara. Á sunnum búskaparligum grundarlagi vil Javnaðarflokkurin virka fyri, at t.d. Framtaksgrunnurin og Realkreditstovnurin fáa møguleika og fortreytir fyri, saman við vinnuni at menna fíggjarstøðuna hjá hesum týdningarmikla parti av flota okkara.

Nú, eins og fyrr, vilja vit verja vunnin rættindi og finna loysnirnar til trupulleikarnar í samfelagnum.

Hinir flokkarnir kunna so stríðast um prinsippis og háfloygdar útsagnir.

Pappírsborg hjá loysingini:

# Modellið stendur á borðinum. Og er av pappír. Høgni (Kjartan@), Anfinn K og S.P í Grund, skoða verkið

**Marjus Dam**
*Sambandsflokkurin*



Nú undan valið verður óført brúkt av plasticmáling, so modellið vinnur kappingina. Teir vita, at neyðugt er, at verja papírsmodellið ímóti regni, vindi og stormi. Um tað regnar, rennur málingin av, húsið blotnar og fellur saman. Um vindur kemur, fýkur alt um koll. Hetta modellið er bygt upp av teori, tí kann tað standa á borðinum, væl vart av vindi og regni. Men modellið kann ikki byggjast í fullari stødd. Tað heldur ikki. Tí mangt ber til á pappíri, sum ikki ber til í veruleikanum....

**Sambandsflokkurin**
Vit hava onki modell av pappíri. Vit kunnu bert vísa føroyingum á okkara samfelag Føroyar. Vit eru ein tjóð, har fólk hava møguleika at arbeiða, vinna sær til dagsins føði og seta førur undir egið borð. Í okkara veruliga landi datt onkur bygningur niður, tí loysingarfólk fóru at taka stúttur niður, uttan at hugsa um avleiðingarnar, hóast ávaringar. Men við felagsstríði og hjálp av stórum krana úr Christiansborg, var bygningurin fingin uppá pláss aftur. Tað hendi seinast fyri 10 árum síðani.

Nú vilja vit í Sambandsflokkinum styrkja hús okkara. Vit vilja tjøra tað vit gamlari tjøru, ið verjir væl ímóti roti. Flagtak liggur á og grundin er kálka. Eitt gott føroyskt hús, í heldur ímóti regni og stormi. Vit vilja bøta um húsi, so tað gerst betur hjá okkum, ið her búgva. Tað er nakað vit eiga at gera alla tíðina. Vit ætla eisini at útbyggja, so pláss verður fyri fleiri.

**Pappírsborgin undir glas:**
Vit halda, at pappírsborgin hjá Anfinni og Høgna, serliga eftir at plasticmáling er komin á, er vøkur á at líta. Hon hevur tí best uppiborið at verða sett undir glas, og givin fornminnissavninum. Tí um nøkur ár er sera týdningarmikið, at føroyingar kunnu síggja hvussu ørir nakrir føroyingar vóru í ár 1998 - 2002. Teir ætlaðu nevniliga at gamla føroyska húsið skuldi brótast niður -og pappírsborg skuldi koma ístaðin.

Men Sambandsflokkurin vildi heldur bøta um føroyska húsið. Vit vilja hava nakað trygt - nakað í verjir ímóti stormi og ódn.

Onki eksperiment av pappíri við tjóð okkara.

X fyri Sambandsflokkin

# Politisku fingrarnar burtur!

**Páll á Reynatúgvu**
*Valevni fyri Tjóðveldisflokkin*



Tjóðveldisflokkurin er flokkur verka- og fiskimanna og verjan av viðurskiftunum hjá fiskimonnum og verkafólki kemur tí altíð at vera ein av súlunum í tjóðveldispolitikki. Grundarlagið er fólksins rættur til at skipa seg í øllum samfelags viðurskiftum. Vit meta henda sjálvsagda avgerðarrætt at verða bulin undir øllum fólksins virksemi, bæði tá ið tað snýr seg um arbeiðsmarknaðarviðurskifti, ið mun til hvat og hvønn vit starvast við, men líkaso sjálvsagdan tá ið tað snýr seg um tjóðarfrælsi føroyinga.

**Trivnaður á arbeiðsmarknaðinum**
Arbeiðsmarknaðarpolitikkur tjóðveldisflokksins snýr seg fyrst og fremst um at fáa trivnað á arbeiðsmarknaðinum. Tjóðveldisflokkurin virkar fyri at arbeiðsmarknaðurin átekur sær størri sosialar skyldur, meðan almennu skipanirnar veita grundleggjandi sosiala trygd.

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga við sáttmálasamráðingum at tryggja:

* Rættindi til ávirkan á egið arbeiðspláss
* Rættvísa løn fyri førleika og royndir
* At arbeiðsmarknaðurin átekur sær skyldur mótvegis umhvørvi, arbeiðsumhvørvi, trivnaði og eftirútbúgving hjá arbeiðsfólkinum
* At arbeiðsmarknaðurin skapar møguleikar fyri parttíðarstørvum og niðursettari arbeiðstíð
* At arbeiðsmarknaðurin skapar møguleikar fyri vardum størvum til fólk við breki
* At vinnan eisini átekur sær skyldur til tessat lívið eftir arbeiðstíð og eftir pensiónsaldur er nøktandi og trygt
* Javnstøðu millum menn og kvinnur á arbeiðsmarknaðinum

**Við tá ið væl gongur, ímóti tá...**
Vit meta samstundis at tað er altavgerandi at arbeiðsmarknaðurin, verkafólk og arbeiðsgevarar, í størst møguligan mun loysa síni viðurskiftir í samráðingum. Netupp tí skal politiska skipanin í minst møguligan mun avgera viðurskiftir á arbeiðsmarknaðinum, og í besta føri við staðfestandi lóggávu sum fylgja av semju á arbeiðsmarknaðinum. Tí vit hava óteljandi dømi um at politiska skipanin, ikki bara arbeiðir við arbeiðsmarknaðinum um samfelagsliga rákið vendir. Hjálpandi hondin, kann léttliga gerast beinspenni ið tekur aftur vunnin rættindi. Vit ynskja ikki skiftivís at vera við, og ímóti verkafjøldini.

Tjóðveldisflokkurin ynskir sterk føroysk fakfeløg sum eru før fyri at taka dystin upp við mótpartin á arbeiðsmarknaðinum. Vit ynskja gott samstarv við fakfeløgini, men vit ynskja ikki fakfeløg ið skylda nøkrum flokki nakað.

Skottið millum politikk og fakfelagsvirksemi skal vera púra tætt. Júst á sama hátt sum skottið millum politikk og vinnulív skal vera tætt.

**Barsilsskipan, dagpeningaskipan og arbeiðsumhvørvi**
Rætt skal vera rætt. Vit hava avrikað nógv á arbeiðsmarknaðarøkinum seinastu 4 árini. Viðurskifti sum hava verið vanrøkt í áravís og hava ligið á láni.

Bestu dømini eru barsilsgrunnurin, dagpeningaskipanin, tað at karensdagarnir hjá tímaløntum vóru avtiknir, og arbeiðsumhvørvislógin. Trý stór mál sum øll eru loyst í hesari samgonguni, og sum eru góð dømi um frambrot á arbeiðsmarknaðinum, samstundis sum politiska skipanin virðir samlaðu støðuna hjá arbeiðsmarknaðinum.

Eingin nýtist at vera í iva um tað vit siga, og at vit virka út frá tí. Vit ynskja framhaldandi styrki hjá fakfeløgunum og geva ikki lyftir upp undir val ið vit møguliga ikki klára at halda tá ið vit koma til valdið aftur. Vit fara í komandi samgongu at arbeiða fyri eini rættvísari arbeiðsmarknaðareftirløn, har samhaldsfesti er bulurin, og vit fara at arbeiða fyri at leingja barnsburðarfarloyvið uppí 12 mánaðir. So mikið kunnu vit lova.




ítróttur

Nr. 72 • mikudagur • 17. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Vejle vil vinna á skriviborðinum

**Tað kann kosta AB sigurin í Vejle, at teir sunnudagin høvdu fýra spælarar í senn á vøllinum, sum ikki eru ES borgarar**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*




Í gjár varð staðfest her í blaðnum, at Vejle var nærri niðurflytingarplássinum, enn teir høvdu verið undan vikuskiftinum. AGF hevði við 2–2 javnleikinum á heimavølli ímóti AaB lyft seg nærri upp ímóti Vejle, sum tapti 4–0 ímóti AB.

Men nú er komið fram, at AB hevur gjørt ein brølara, sum tað er sannlíkt fer at kosta teimum øll stigini. AB hevði síðstu níggju minuttirnar fýra spælarar á vøllinum, sum ikki eru ES borgarar. Reglurnar siga, at tað er ikki loyvt at hava fleiri enn tríggjar spælarar á vøllinum í senn, sum ikki eru ES borgarar. Teir í AB vístu DBU á, at teir høvdu gjørt eitt mistak.

Í donsku fjølmiðlunm verður víst á, at um tað fer at ganga, sum tað áður hevur gingið í sovornum støðum, so fer AB at missa stigini, og Vejle fer at fáa stigini. Í hesum sambandi verður víst á skriviborðsmistakið hjá Herfølge fyri knøppum seks árum síðani. Í august 1996 spældu teir ímóti AGF. Aftaná vísti tað seg, at Herfølge ikki hevði syrgt fyri, at spæliloyvið hjá Jákupi Mikkelsen varð flutt frá KÍ og til Herfølge. Tað hevði við sær, at AGF vann stigini.

Á vøllinum hevði Herfølge vunnið dystin, men teir mistu stigini. Tað kostaði teimum silvurkrónurnar og harvið Europa Cup luttøku. Nú verður mett í donsku fjølmiðlunum, at tað eigur at ganga á sama hátt hjá AB, sum tað fyri seks árum síðani gjørdi hjá Herfølge. Avgerðin verður tikin í hesi vikuni, og í Vejle fjala teir ikki, at stigini høvdu komið væl við hjá teimum.

Í Vejle høvdu teir annars longu frammanundan heitt á DBU um at fáa dystin ímóti AB spældan umaftur. Teir vísa á, at sjónvarpsupptøkurnar greitt vísa, at dómarin ikki dømdi mál, tá Vejle longu eftir tíggju minuttir skoraði til 1–0. Bólturin støkk út aftur í spæl, eftir at hann hevði tikið jarnstólpa inn í málinum.

# Trúgvur stuðul hjá billardítróttini

BILJARD
*Jan Müller*

Trúgvur hevur hann verið, stuðulin hjá oddaspælarunum í billard í Klaksvíkar Klubba. Tummas Johannessen hevur trúðliga øll árini ferðast kring Føroya land fyri at stuðla sínum monnum, tá avgerandi kappingar hava verið. Hann var við á Tvøroyri, tá Sonhard Johannessen sum fyrsti klaksvíkingur nakrantíð vann FM-heitið fyri einstaklingar, og hann var aftur við í Havn, nú Kristian Suni Høgnesen vann sítt fyrsta FM-heiti.

Í billardkappingum eru dómarar alfa og omega. Og man Tummas eiga tað, ið mest líkist einum Føroyameti í døming eisini. Tá fremmand lið vitja í Klaksvík eru altíð boð eftir Tummasi at reisa keylur og telja saman nógvu eyguni hjá liðfeløgum sínum. Hann er vorðin ein fastur táttur í billardmyndini, serstakliga kring eitt av landsins elstu og bestu billardborðum, tað í Klaksvíkar Klubba.



*Á myndini síggja vit FM-meistaran saman við stuðli sínum eftir lokna kapping – í góðum hýri. Kristian Suni vísir okkum tríggjar sigursfingrar, ein fyri Haldor Holm-kappingina, ein fyri FM fyri lið og ein fyri FM fyri einstaklingar. (Av tí at henda myndin kom skeivt fyri í blaðnum í gjár seta vit hana í av nýggjum)*

*Mynd: Jan*

# Brøndby venjarin hevur lagt kongin

**Øll í felagnum siga seg harmast um, at norski venjarin hevur lagt frá sær, men fyrrverandi málverjin sigur, at hann er vísur í, at venjarin hevur fingið sekkin**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Sjógvarnir ganga høgir í Brøndby í hesum døgum. Eftir at munurin frá oddaliðnum og aftur til FCK sunnudagin var svunnin niður í tvey stig – í vetrarsteðginum var hann tíggju stig – boðaði norski venjarin, Åge Hareide, mánadagin frá, at hann ikki helt seg til framvegis at hava ábyrgdina av Brøndby liðnum í superliguni. Hann vildi sleppa burturúr venjarastarvinum, tí hann kendi seg ikki hava tað yvirskotið, sum skal til, um venjarin skal megna at geva spælarunum rætta íblásturin.

Hóast soltnu úrslitini í vár, so kom uppsøgnin sum ein bumba. Tað eru bara nakrir dagar síðani, at Åge Hareide og Brøndby samdust um, at samstarvið skuldi halda fram til nýggjárs. Sáttmálaskeiðið varð annars liðugt í summar.

Vit harmast avgerðina hjá venjaranum. Tað søgdu stjórin í Brøndby, Per Bjerregaard, og liðformaðurin og málverjin, Mogens Krogh.

Samstundis sum teir næstu – so at siga – søgdu seg harmast um nýggju støðuna. So var fyrrverandi Brøndby málverjin av einari heilt aðrari áskoðan. Peter Schmeichel legði ikki fingrarnar ímillum, tá hann seinnapartin mánadagin kom úr Onglandi og til Keypmannahavnar at taka lut í sjónvarpssending um fótbólt. Hann segði seg vera fullvísan í, at stjórin í Brøndby við teknum, sum ikki kundu misskiljast, hevði givið norska venjaranum tað hugskotið, at hann átti at taka seg aftur sum venjari.

Brøndby setti mánadagin Tom Køhlert í venjarastarvið. Hann hevur áður verið høvuðsvenjari í Brøndby. Hesa seinastu tíðina hevur hann havt ábyrgdina av at menna ungar spælarar. Tom Køhlert er ein fyribils loysn, meðan Brøndby leitar eftir nýggjum venjara.

Åge Hareide sigur, at nú fer hann at halda frí og hvíla seg. Men tíðindini eru longu farin at ganga um, hvat næsta starvið hjá honum verður. Venjarin hjá Rosenborg hevur boðað frá, at hann ætlar sær úr starvinum, tá norska kappingarárið verður liðugt í heyst. Rune Braseth, sum fyri ikki so nógvum árum síðani var miðverji í Werder Bremen og á norska landsliðnum, er nú stjóri í Rosenborg. Hann sigur, at Åge Hareide avgjørt er eitt evni til venjarastarvið í Tróndheimi.